## Avloysarastarv

Søkt verður eftir fólki til fulltíðarstarv á Dómaraskrivstovuni til setan skjótast gjørligt. Setanartíðin er 6 mánaðir.

**Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur:**

- Vanligt skrivstovuarbeiði
- Skráseting á teldu
- Telefonavgreiðslu

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst:

- Skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving
- Góð evni at samskifa á føroyskum og donskum máli
- Teldufórleiki á brúkarastøði
- Góð samstarvsevni

**Setanartreytir:**
Løn- og setanartreytir eru sambært felagssáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet. Setanarøkið fevnir um allar deildir á Dómaraskrivstovuni.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Kathrinu Magnussen, skrivstovuleiðara, tlf. 311003.

**Umsóknir:**
Umsóknir, prógv og møgulig viðmæli skulu verða Dómaraskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 5. juli 2002.

**Sorinskrivarin í Føroyum,**
tann 21. juni 2002
Jørgen B. Petersen, adm.

## Ólavsøkuframsýningin 2002

Listafelag Føroya skipar fyri Ólavsøkuframsýning í Listaskálanum. Øll kunnu senda inn verk til Ólavsøkuframsýningina.

Verkini skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. juli. Saman við verkunum skal vera listi yvir tøkni, heiti og prís, um verk eru til sølu, og øll verk skulu vera týðiliga merkt samsvarandi listanum.

***Tilmeldingarblað til framsýningina fæst í Listaskálanum.***

Myndir undir glasi skulu hava rammu.

Listafelagið setir eina nevnd at skipa fyri framsýningini, og tilskilar sær rætt til at taka dagar ímillum, hvussu úrval og samanseting skulu vera.

Listaskálin er opin mánadag-fríggjadag kl 11 - 17, leygardag og sunnudag kl 14 - 18.

**Listafelag Føroya**
**Gundadalsvegur**
**postsmoga 1141**
**FO-110 Tórshavn**
**tlf 31 35 79**

Sosialurin - Tel. 311820

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Útbjóðing

Tórshavnar kommuna bjóðar við hesum koyringina av bussleiðini út í almenna útbjóðing.

Møguleiki er at bjóða uppá eina, fleiri ella allar leiðir, sum eru leið 1, 2, 3, 4, 4x og skúlaleið.

Útbjóðingartilfarið fæst við at venda sær til:

Snarskivuna
Vaglið
FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 51 60

Í seinasti lagi 05. august 2002.

Ímóti krossaðum kekki, ájlóðandi kr. 5.000,-, sum verður latið teimum bjóðandi aftur, tá ið útbjóðingartilfarið er latið Tórshavnar kommunu aftur.

Tilboðini skulu verða Tórshavnar kommunu, postrúm 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. august 2002 kl. 13.00, tá tey verða latin upp í býráðssalinum. Teir bjóðandi kunnu vera hjástaddir.

SNARSKIVAN

## Sethús til sølu





Sethús á Kambsdali til sølu, um hóskandi boð fast.

**Telefon : 444244 ella 212656**

## Loppumarknaður

Kyndil skipar fyri loppumarknaði í miðbýnum leygardagin 6. juli. Tikið verður ímóti lutum (ikki klæðir) hósdagin 4. juli frá kl. 17 til kl. 19 í Kyndilshølunum í Gundadalshøllini.

Tit eru vælkomin at ringja á tel. 312234 Erla ella tel. 317022 Katrin, um tit hava størri ting, sum skulu avheintast.

**Kyndil**

## Hús í Leynum til sølu



Hús í Leynum til sølu um hóskandi boð fæst.

Húsini eru 42 frm., við hálvum kjallara. Í stovuhæddini er stova og alrúm í einum. 2 sovikømur, gangur og wc.

Í kjallaranum er gangur, fýrrúm og brúsa.

Vídd á grundøkinum er 451 frm.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

Óli Regin Hansen

**tlf. 311810**
**fax 318310**

Fa / Bormann
Boring , Sprenging , grevstur .
Tlf. 225421

## Vaskifólk

Søkt verður eftir fólki til at vaska rávørumóttøku- og pakkihøllina á P/F Kollafjørð Pelagic í Kollafirði.

Arbeiðið fer fram eftir vanliga arbeiðstíð.

Arbeiðið byrjar 1. juli 2002.

**Eysturoyar Reingering**
Postboks 41, 650 Toftir
448988 & 225350

## Til sølu

Scania 112 6x4 dumpari
Scania 142 6x2 dumpari
Scania 141 6x2 dumpari
Scania 143 6x4 chassis
Volvo F16 Dumpari

**Tlf. 228543**

## Venjari søkist

Høvuðsvenjari til svimjifelagið Ægir søkist til svimjiárið 2002–2003. Løn sambært sáttmála. Umsókn sendast til Ægir, Postboks 342, 700 Klaksvík, í seinasta lagi 15. juli. Nærri upplýsingar fáast við at ringja til Dan Mikkelsen, tlf. 222207.

**Ægir**

Sosialurin
www.sosialurin.fo



# ítróttur

Nr. 122 • leygardagur • 29. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


# Tað verður bekkspurtað allan vegin




*Á stutta málinum í Vági er einki at ivast í, at talan verður um ein langan spurt, tá bátarnir, sum vanliga rógva 1500 metrar, fara undir sínar róðrar*

**Startspurturin verður uppaftur meiri avgerandi á jóansøku, enn hann hevur verið í undanfarnu kappingunum**

FM KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Tíðin flýgur avstað. Í dag er fjórði FM kappróðurin á skránni, og harvið er róðrarárið meiri enn hálvrunnið. Einki FM heitið verður formliga vunnið í dag. Men um genturnar umborð á Sílinum og kvinnurnar umborð á Jarnbardi vinna í Vági, so er sera ilt at ímynda sær, at tað skal bera til at hótta hesar manningarnar.

Genturnar og kvinnurnar kappast á 1000 metrum. Tískil verða hesar báðar kappingarnar í dag undir somu treytum, sum tað hevur verið kappast á teimum trimum undanfarnu stevnunum. Higartil hevur eingin hótt Sílið við gentum. Tí verður talan um sanna sensatión, um genturnar í Havnar Róðrarfelag ikki vinna í dag.

Jarnbardur við kvinnum var suverenur í tveimum teimum fyrstu kappingunum. Í Hósvík vunnu tær eisini, men tann sigurin var ikki so tryggur, sum hinir báðir vóru tað. Riddarin úr Miðvági hevði hug at bjóða av. Spurningurin er so, um tað í dag verða uppaftur fleiri knotur í vágakvinnum, enn tað vóru síðsta leygardag. Kvinnurnar á Páll Fanga vóru nógv bestar í fjør. Higartil hevur tað ikki ligið fyri hjá somu manningini í Klaksvík, sum vann so nógv í fjør. Tær siga seg ikki hava givið skarvin yvir, og tær skulu neyvan heilt avskrivast.

Dreingirnir kappast í Vági á sama teininum, sum teir altíð gera. Men í tí kappingini er lagt upp til rættuligan spenning. Fípan Fagra vann tvær tær fyrstu ferðirnar, men fyri einari viku síðani var Sílið fremst. Blikur hevur verið framvið í øllum kappingunum, og báturin, sum tvey tey seinastu árini hevur vunnið FM, Tjaldrið, eigur ikki at verða avskrivaður, hóast tað ikki enn hevur hilnast heilt væl hjá honum í ár.

### Nýggj og opin kapping

6–mannaførini við monnum, 8–mannaførini og 10–mannaførini fara í dag undir so at siga nýggja kapping. Stigini, sum eru vunnin í undanfarnu kappingunum, eiga manningarnar sjálvandi. Men í dag og í hinum báðum kappingunum, sum verða seinni í juli í Miðvági og á ólavsøku, fer alt at ganga fyri seg á eitt túsund metrum og ikki á 1500 og 2000 metrum, sum hesir bátarnir higartil í ár hava kappast á.

Stóri spurningurin undan jóansøkuróðrinum er, hvussu tað, at teinurin nú er væl styttri, enn hann hevur verið, fer at ávirka kappingina.

Tað er altíð sera týdningarmikið í kappróðri at fáa góðan start, men tað er uppaftur týdningarmiklari, tá teinurin er stuttur.

Hetta vóru bátsformaðurin á Havnarbátinum, Magni Brøðraberg, og bátsformaðurin umborð á Klaksvíkinginum, Martin Venned, samdir í, tá vit eftir Sundalagsstevnuna tosaðu við teir.

Undanfarnu árini hevur tað víst seg, at kappingin millum 10–mannaførini á 1000 metrum hevur verið ein langur spurtur. Á 2000 metrum er startspurtur, miðróður, sum teir kalla tað, og endaspurtur. Í miðróðrinum er nógv taktiskt spæl, har onkrir fara upp í bekk eina ella fleiri ferðir og styttri og longri teinar. Á 1000 metrum verður spurtað allan vegin, og føturnir sleppa ongantíð bekkinum. Broyttu umstøðurnar eru við til at gera róðurin í Vági sera spennandi.

Undanfarnu kappingarnar leggja eisini upp til stóran spenning. Í Vági eru tey sjálvandi serliga spent uppá, um tað fer at eydnast Smyrli í heimasjógvi at vinna róðurin millum 6–mannaførini, ella um Páll Fangi skal endurvinna plássið, sum hann vann í Klaksvík og á Skálafjørðinum.

Kvívíkingur og Argjabáturin fara at kappast um fremsta plássið millum 8–mannaførini, og so er tað kappingin millum 10–mannaførini. Har er alt fullkomuliga opið. Eysturoyingur hevur vunnið tvær ferðir, og Havnarbáturin vann í Hósvík. Vestmenningurin og Klaksvíkingurin hava higartil ikki vunnið, men teir hava verið framvið, og eingin ivi er um, at bæði í Vestmanna og ikki minst í Klaksvík eru teir sera tystir eftir at vinna. Neyvan nakrantíð áður hevur uppleggið undan einum kappróðri verið so spennandi, sum tað er undan 10–mannafarsróðrinum hesa ferð.